**Fíggjarmálaráðið, Lønardeildin**

# Reglugerð fyri nær loyvi verður givið til afturkeyp og flytan av uppsparda virðinum í eftirlønarskipanum undir Fíggjarmálaráðnum

**§ 1.** Henda reglugerð ásetur treytirnar fyri, nær eftirlønarveitari kann játta afturkeyp av uppsparda virðinum í eftirlønarskipan, sum kemur undir sáttmála, har Fíggjarmálaráðið er sáttmálapartur. Talan er um útgjald í ótíð, t.e. áðrenn eftirlønarsamansparain hevur fylt 67 ár. Eisini ásetur reglugerðin treytirnar fyri at flyta samanspart virði millum eftirlønarveitarar, sum hava loyvi til at reka eftirlønarvirksemi í Føroyum.

**§ 2.** Reglugerðin umfatar eftirlønarskipanir, har alt ella partur av eftirlønargjaldinum er inngoldið sambært sáttmála, har Fíggjarmálaráðið er sáttmálapartur, og har tað í eftirlønaravtalu er ásett, at afturkeyp kann vera loyvt, um Fíggjarmálaráðið góðkennir tað.
Henda reglugerð er galdandi fyri uppsparda virðið av eftirlønarinngjøldum, ið eru inngoldin fyri 1. januar 2014.

**§ 3.** Henda reglugerðin ásetur treytirnar fyri afturkeyp av tí partinum av uppsparda virðinum, sum stavar frá inngjøldum sambært sáttmála, har Fíggjarmálaráðið er sáttmálapartur.
Tann parturin av uppsparda virðinum, sum stavar frá inngjøldum sambært sáttmála, har Fíggjarmálaráðið ikki er sáttmálapartur, er ikki umfataður av hesi reglugerð.

**§4.** Eftirlønarveitarin kann játta afturkeyp av uppsparda virðinum í eftirlønarskipan, tá ið onkur av niðanfyri standandi treytum í pkt. 1 – 4 í hesi grein er uppfylt.
Afturkeyp av uppspardum virði í eftirlønarskipan sambært sáttmála við Fíggjarmálaráðið kann verða loyvt:

**1. <u>um</u>** persónurin hevur fylt 60 ár og er farin av arbeiðsmarknaðinum ella hevur fingið tillutað fyritíðarpensión sambært lóg um almennar pensjónir. Í báðum førum er tað ein treyt, at **loypandi árligu veitingarnar**, sum høvdu komið til útgjaldingar av lívrentu ella lutapensjón, ikki fara upp um eina grundupphædd, sum er mánaðarlønin á stigi 45 hjá tænastumonnum landsins (kr. 35.005,77 tann 1. oktober 2015). Tann parturin av virðinum, sum er skattaður frammanundan, verður umroknaður við at býta við 0,6.

**2. <u>um</u> alt** uppsparda virðið er í mesta lagi grundupphæddin nevnd í pkt. 1, og kontan er óvirkin (einki goldið inn seinastu 12 mánaðirnar). Tann parturin av virðinum, sum er skattaður frammanundan, verður umroknaður við at býta við 0,6.

**3. <u>um</u>** persónurin varandi flytur úr danska ríkinum, t.e. meldar seg úr landsfólkayvirlitinum og/ella folkeregisteret, ikki hevur arbeiði í Føroyum ella í Danmark og ikki hevur inngoldið til skipanina seinastu 12 mánaðirnar. Í hesum føri kann uppsparda virðið vera upp til hálvaaðru ferð treytirnar í pkt. 1. (1,5 x kr. 35.005,77 tann 1. oktober 2015). Tann parturin av virðinum, sum er skattaður frammanundan, verður umroknaður við at býta við 0,6.

**4. <u>um</u>** persónurin ikki er borgari í danska ríkinum, fer úr starvi sínum og flytur varandi úr danska ríkinum

**§5. Flyting til annan eftirlønarveitara:** Loyvt er at flyta uppspart virði til annan eftirlønarveitara, um so er, at eftirlønarskipanin, flutt verður til, er góðkend av Fíggjarmálaráðnum. Treytin er, at tað í avtaluni, flutt verður til, er ásett, at afturkeyp bara er loyvt sambært hesi reglugerð.

Argir, 14. apríl 2016

Snorri Fjallsbak
stjóri

Kvíggjartún 1 • Postsmoga 2039 • FO-165 Argir • E-mail: fmr@fmr.fo